# 1940-1945

## Nýggj kommuna í Sundalagnum

Í 1943 hevði sóknarstýrið viðgerð av umsókn frá bygdunum í Sundalagnum viðvíkjandi áheitanini á løgtingið um at gerast sjálvstøðug kommuna.

89 undirskriftir við áheitan um hetta vórðu sendar frá bygdunum Svínáum, við Norðskála og av Oyri.

Ein meiriluti av kommunustýrinum, eiðismenninir Jens Arni Kruse, Óli A. Ellingsgaard og Olaf Ellingsgaard, mæltu til at viðmæla umsóknini, men at markið varð sett soleiðis, at Svínáarhagin og Norðskálahagin verða mark millum kommunurnar. Sostatt skuldu Svínáir framvegis hoyra til Eiðis kommunu.

Alfred Dam og Jógvan Joensen høvdu uppskot um, at fólkið í Svínáum sjálvt skuldi ráða fyri, hvørja kommunu tey vildu vera í, men hetta uppskotið fall. Tað fekk bert tvær atkvøður.

Oyri, Oyrarbakki og Norðskáli gjørdust sjálvstøðug kommuna 1. januar 1944.

## Telefonstøð á Oyrarbakka

7. november 1943 viðmælir Eiðis komm-



*Myndin er tikin undir kríginum. Menn eru afturkomnir av útróðri og avreiða veiðuna, sum verður skipað umborð á skip, ið liggja á fjørðinum fyri at fáa last, sum síðani verður sigld á bretska marknaðin.*

unustýri, at ein telefonstøð verður á Oyrarbakka, eftir at Føroya løgting hevur sett ynski fram um eina slíka.

## Vegpening frá enska hervaldinum

Á fundi 3. desember 1943 verður upplýst, at enska hervaldið hevur játtað at gjalda kr. 6.000,- sum veggjald fyri nýtslu av vegnum Eiði-Oyrar.

## Ætlan um bátahavn

Í 1942 sendi kommunustýrið umsókn til løgtingið um studning til eina bátahavn. Í grundgevingini verður sagt:

„Av tí at viðurskiftini hjá okkum eru sera ring, at vit hvørt kvøld mugu draga bátarnar upp, er tað illa gjørligt við teimum bátum, vit nú brúka. Eisini kann tað vera toluligt útróðrarveður á lágætt, men ikki farandi frá landi og tá komið verður aftur av havinum við farmi, er mangan ikki lendandi.“

## Høsnagarð

Í august 1942 fær Anton Kruse byggiloyvi til ein høsnagarð yviri „Millum Garðar.“

## Bretsk herstøð uppi á Kolli

13. apríl 1940 hersetti Ongland Føroyar, og hermenn vórðu settir út á øll týðandi støð í Føroyum, tó flestir vóru teir á Skálafjørðinum, í Tórshavn og í Vágum. Um hetta eru nógvar bøkur skrivaðar.

Fyrireikingar vórðu eisini gjørdar á Eiði, tí her komu bretar eisini at vera. Um mánaðarskiftið apríl-mai 1942 kom norskur bátur, ið sigldi fyri bretska hervaldið, til Eiðis við sementi, sum skuldi nýtast til at

*Myndin er tikin eftir vegnum út á kei undir krígnum, tá nógvur útróður var á Eiði. Tað vóru sjey- og 8-mannafør, ið róðu út hiðani. Her sita menn og egna línu. Við bryggju liggur Dúgvan hjá meiarínum í Havn, ið sigldi fasta rutu norður í Sundalagið tveir dagar um vikuna.*





*Fýra av hermonnunum, ið vóru knýttir at bretsku herstøðini á Eiði.*

byggja hús uppi á Kolli, og annað stoypiarbeiði. Hesin dagur mundi vera fyrsti arbeiðsdagur fyri bretska hervaldið á Eiði.

Tann, ið hevði leiðsluna av hesum arbeiði, var H.C.W. Tórgarð, timburmeistari úr Havn, men tá hann ivaleyst hevði annað arbeiði at síggja til í Havn, so hevði hann Jóannes Mørkøre á Eiði, Jóannes hjá Hermanni, til at leiða arbeiðið fyri seg, men kom tó av og á til Eiðis at hyggja, hvussu arbeiðið gekk.

Teir menn, ið byrjaðu hetta arbeiðið, og sum vóru við, til liðugt var, vóru hesir: Jóannes Mørkøre, formaður, Jógvan Ell-

*Eiðismenn, ið arbeiða uppi á Kolli, fáa sær. Á myndini eru Johan hjá Peturi, Asbjørn í Króki, Johannes Josef á Brúgv og Jákup Pauli á Trætistykkinum.*





*Varðtornið, sum bretar løgdu úti á Borgini uppi á Kolli. Á myndini, sum er tikin í 1946, eru hesi: Andrea hjá Fríðu, Selma á Lofti, Havstein á Látrinum, Jaspur í Fjósinum, Otto hjá Olufi og Johannes Josef á Brúgv.*

ingsgaard, Jákup Pauli Joensen, (seinni Krossá), Sofus Nygaard, Johan Peter Johansen, Johan Kruse, Poul Johs. Poulsen, Johs. Josef Poulsen, Richard Mørkøre, Erhard Poulsen, Jákup Joensen (seinri Merkistein), Alfred Poulsen, Sverri Festirstein, Kornelius Joensen, Asbjørn Mørkøre, Eirikur Andreasen, Jaspur Ellingsgaard.

Fýra mans úr bygdini vórðu settir í fast starv við at bera niðan á Koll. Teir bóru alt, ið tørvaði: Kol, olju, matvørur. Hesir menn vóru Hans J. Ellingsgaard, undir Brekkuni, Óli Ellingsgaard, í Fjósinum, Olaf Ellingsgaard hjá Mallu og Hans Poulsen á Brúgv. Hesir vóru í arbeiði eitt ár. Eftir teir komu Grias Ellingsgaard hjá Mallu, Tóraldur Kollsker hjá Tominu, Karlton Poulsen og Jákup Merkistein.

Ytst á Kollinum, úti á Borgini, varð bygt eitt torn í trimum hæddum, niðasta hædd úr betong, hinar báðar úr tvískinnaðum timburi, við sandi ímillum; í ovastu hædd varð settur ein ljóskastari, sum tó neyvan nakrantíð kom í nýtslu. Úr motorhúsinum og út til tornið vórðu lagdir elkáplar, ið vórðu bundnir saman í einum lítlum húsi, ið stóð á miðjari leið út til tornið.

Húsini á Kollinum vóru liðug mánaðarskiftið nov.-des. 1942, og eina góða viku fyri jól komu so eingilskmenninir, um 30-40 í tali, til Eiðis at vera, hesir vóru í aldri frá 19 til u.l. 35, allir vóru úr R.A.F., Royal Air Force. Teir komu at verða á Eiði í 2 ár tilsamans, nakrir teirra vóru alla tíðina, meðan aðrir skiftu. Tá onkur var fluttur aðrastaðni, kom nýggjur aftur í staðin.

Tá teir komu, fingu teir losjuhúsini og eina barakk, ið varð bygd við síðuna av losjuni, at búgva í, og nakrir komu at húsast í dansistovuni; har búði eisini tann hægsti; har varð maturin eisini tilgjørdur, og ein partur av salinum varð gjørdur til matarhøll ella matstovu.

Teir hermenn, ið vóru á Eiði, vóru flestir eingilskmenn, nakrir vóru skotar og nakrir kanadiumenn.

Tá komið var út í 1944, fóru so bretarnir av Eiði. Tað merktist rættiliga væl. Í bygdini virkaði alt meira tómligt, men sum tíðin leið, vandist bygdarfólkið við hetta, og so líðandi kom alt aftur í ta legu, sum hevði verið fyrr.

*(Úr fyrilestri hjá Jákupi Merkistein 1994).*